# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Óskipað hovsaloysn

Landsstýrismaðurin í innlendismálum, sum umsitur Strandferðsluna, hevur gjørt av, at flyta umsitingina av Strandferðsluni til Suðuroyar. Sjálvt hugskotið um at flyta umstingina er ikki nýtt. Tað hevur verið borið fram áður og hevur eisini fingið politiska og almenna umrøðu fyrr. Men nú hevur Jákup Vestergård so skorið ígjøgnum og hevur so at siga í eini handavending tikið hesa avgerð.

Hetta er á mangan hátt ein trupul avgerð. Hon er trupul, tí hon nemur við so nógvar mannalagnur, og ásannast má, at avgerðin er eitt sera stórt og ógvusligt inntriv í dagliga lívið hjá starvsfólkunum í umsitingini. Synd er at siga, at málið er professionelt handfarið av umsiting landsstýrismansins. Tað kann als ikki góðtakast, at almenn stravsfólk frætta um so ógvusligar broytingar í starvsviðurskiftunum gjøgnum fjølmiðlarnar.

So er tað sjálv avgerðin. Tað er væl skiljandi, at ein landsstýrismaður, ið hevur politisku ábyrgdina av útjaðaramálum, leitar eftir tiltøkum, sum veruliga gera mun í gerandisdegnum í útjaðaranum. Eitt vælkent tiltak er at flyta stovnar og hetta er eisini millum tilmælini í teimum útoyggjaálitum, sum eru til taks. Hugsað verður sum so: útjaðaranum trýtur arbeiðspláss. Høvuðstaðurin hevur ov mikið av arbeiðsplássum, vit flyta nøkur av hesum út úr Havnini. Vit taka frá teimum, ið hava nógv og geva teimum, ið minni hava. Í og fyri seg ein vakur tanki, sum flestøll ivaleyst kunnu stuðla, men hann er ikki vandaleysur at seta í verk, og hetta er tí ein trupul avgerð.

Hetta at nýta útflyting sum menningarhjálp til útjaðarin er ikki nakað ein ger við einum títlingabresti. Skal ein nýta hetta amboð, so eigur hetta at fyrireikast sera væl, so allir partar í skipanini fáa høvi, umstøður og tíð til at fyrireika seg. Soleiðis er eftir øllum at døma ikki farið fram í hesum máli, og tí er nú alt á gosi. Ein kann tí siga sum so: ein vælskipað og vælplanløgd útflyting kann gagna øllum pørtum, meðan ein óskipað "ups" ella "hovsa" loysn kann gera meira skaða enn gagn. Hetta mál tykist ikki væl umhugsað av einum landsstýrismanni, sum annars ikki er kendur fyri at loypa framav, men tvørturímóti oftast tykist at hugsa seg væl um og taka strangt sakligar avgerðir. At hetta eisini eftir øllum at døma verður gjørt sum valagn í einum valári og hevur við sær daprar mannalagnur er eftir okkara tykki langt úti.

**Sosialurin**

## Løgmaður, lurta nú eftir manninum við royndunum

HEÐIN D. POULSEN



Poul Mohr, íslendskur konsul í mong ár og ein tann dugnaligasti og mest kendi núlivandi vinnulívsmaðurin í Føroyum við hollum royndum at samstarva við íslendingar, hevur nú vegleitt løgmanni viðvíkjandi málinum um føroyska sendistovu í Íslandi. Um løgmaður ikki lurtar eftir góðum ráðum frá teimum sum kenna til tey serligu viðurskiftini millum føroyingar og íslendingar og tekur alt málið um sendistovuna í Íslandi upp aftur til nýggja viðgerð, so røkir Løgmaður ikki sítt embæti at umboða Føroyar og føroya fólk til fulnar. Løgmaður hevur fjalt tær veruligu orsøkirnar fyri avgerðini undir tí fína orðinum tign. Nú tá serfrøðin hevur úttalað seg, at ein føroysk sendistova í Íslandi undir Dannebrog hevur ikki nakra tign, so skuldi tað verið nemt hjá løgmanni at tikið avgerð hareftir. At siga, at tað ikki ber til at hava eina føroyska sendistovu í Íslandi uttan Dannebrog á stong er lygn. Sofus Poulsen myndaði eina føroyska sendistovu í Aberdeen í eitt mannaminni við Merkinum sum erpið veitraði uttan fyri King Street í Aberdeen, uttan Dannebrog í eygsjón. Gott nokk kom sendistovan ikki undir altjóða diplomatiskar reglur og fekk Sofus einki diplomat pass at vísa fram, hann var kanska heldur ikki boðin til teir allar fínastu døgurðrarnar hjá drotning og fínum diplomatum, men við sínum heiti, Faroese commercial attaché, kundi Sofus opna mangar dyr, og tað gjørdi hann so sanniliga eisini, við Merkinum í húnar hátt. Ein føroyingur í Íslandi við donskum mandati, fær neyvan tað íslendsku vælvildina sum føroyingar longu nú fáa í Íslandi, kanska er ein Sofus Poulsen tann rætta loysnin?

## Íbúðarbyggingin á Hamrinum á Argjum

HØGNI MIKKELSEN



Nú hevur nógv verið tosað um stóru íbúðarbyggingina á hamrinum á Argjum. Borgarstjórin tosar um at broyta verandi reglugerð um útlutan av íbúðum í kommununi. Tá reglugerðin er broytt, kann farast at luta íbúðirnar á Argjum út, men tað sær út sum Borgarstjórin ikki er komin nakran veg við hesi nógv umtalaðu reglugerð.
Reglugerðin skal fyrst viðgerast í fíggjarnevndini og síðani skal Býráðið taka støðu til hana. Á fíggjarnevndarfundi tann 16. februar fingu vit at vita, at eykafundur fór at verða vikuni eftir, har hon skuldi viðgerast.
Í dag 27. februar, havi eg sum limir í fíggjarnevndini enn ikki fingið fundarboð. Og sambært miðlinum, so kostar hetta kr. 100.000,- um vikuna fyri byggiharran, og enn kann eingi við vissu siga, at reglugerðin verður samtykt í Býránum, og skuldi tað hent, at hon ikki verður samtykt, so kann ein bara ímynda sær tað búskaparligu fylgjunar fyri byggiharran, umframt at tað góngur óneyðuga long tíð til fólk sleppa inn í íbúðirnar – og tað kann ikki vera rætt!
Sum ikki einferð, so var borgarstjórin fremsti maður tá myndir skuldi takast í sambandi við at byggiætlanin fór í gongd, men tíðan verri er hann alt anna enn fremsti maður, nú tað strandar á hjá teimum sum ætla at ogna sær ein íbúð, og ikki minst fyri byggiharran eisini.
Tað er undir alt lágmark, at hava ein borgarstjóra sum ikki hevur tíð at arbeiða fyri borgaran, men bert fyri seg sjálvan.
Sum býðráðslimir eri eg sera harmur um hesa støðu sum borgarstjórin hevur sett tykkum í, og vóni eg bara at hann skjótt kallar fíggjarnevndina saman til at viðgerða reglugerðina.
Eg vil tí heita á borgarstjóran um at vísa borgarnum í Tórsahavnar Kommunu størri virðing, og arbeiði fyri tað sum hann er settur til.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Bjarta Joensen bjarta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo
Eyðhild Jacobsen eydhild@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.